# Hólmin á Eiði er friðaður

Hans Kárason Mikkelsen (HKM) skrivar í einum teigi í Dimmalætting 24. sept. um Hólman á Eiði, og har sigur hann, at tvær dunnur hava forkomið einum ætlaðum stadionøki.

Ein og hvør, sum lesur hatta, hugsar við sjálvum sær, at tað kann ikki vera rætt – og tað er tað sjálvsagt heldur ikki. Greinin er tikin úr leysari luft og vísir einans, hvussu lítið HKM kennir til viðurskiftini.

**Hólmin**
Hólmin er blotin mitt á Eiði, sum fyri einum mannaminni síðan var vatn. Eiðismenn veittu vatnið burtur, og síðan kom hesin serstaki blotin ístaðin. HKM skrivar, at Hólmin er „eitt díki, sum tykist vera friðað." Men her fer hann skeivur, tí Hólmin ikki bara tykist vera friðaður – hann er friðaður. Í Náttúruverndarlógini stendur, at innangarðs eigur ikki at verða bygt nærri enn 300 m frá vøtnum uttan loyvi frá Friðingarnevndini. Fyri fleiri mánaðum síðan gjørdust limir í Fuglafrøðifelagnum varir við, at eitt økið niðri á Hólmanum var uppgrivið. Fuglafrøðifelagið spurdi seg fyri hjá Friðingarnevndini fyri Eysturoyar sýslu og Yvirfriðingarnevndini, og tað gjørdist greitt, at eingin umsókn um loyvi til hesa bygging var komin inn. Seinni varð planerað, og ein barnagarður stendur nú í gerð. Í julimánaði stóð at lesa á heimasíðuni hjá Eiðis Kommunu, at nú skuldi stadion byggjast mitt í Hólmanum. Fuglafrøðifelagnum gjørdist greitt, at her ruggaði neyvan rætt. Síðst í juli heitti Fuglafrøðifelagið tí í skrivi á Friðingarnevndina í Eysturoy um at taka hesi bæði málini upp: Planeringina til barnagarðin og ætlaða stadionøkið.

**Áheitan**
Tað eru tvær orsakir til, at Fuglafrøðifelagið heitti á Friðingarnevndina um at taka hetta mál upp. Onnur orsøkin er, at vit vilja, at tær lógir, sum eru gjørdar til at verja okkara náttúru, verða hildnar. Hin er, at vit meina, at Hólmin eigur at verjast. Í sjálvum Hólmanum hava vit sæð fleiri áhugaverd fuglasløg, eitt nú teymentir, krikkentir og jarðarkonur. Men eisini meina vit, at Hólmin stuðlar tí sera ríka fuglalívi, sum sæst á sjálvum Vatninum og eisini uttanum. Vatnið og økið eru sera áhugaverd. Har kunnu m.a. síggjast gjørir, svanir, súgentir, kolentir, tannentir, tangspógvar, reyðspógvar, svarthálsur, lítlar mýrisnípur og nógv onnur fuglasløg. Tískil meinar Fuglafrøðifelagið heilt greitt, at HKM fer skeivur í sínari lýsing, sum er, at „fuglalív er lítið og einki at síggja til".

**Lógin er brotin**
Støðan nú er tann, at Friðingarnevndin í Eysturoy hevur heitt á Eiðis Kommunu um at steðga arbeiðinum, tí neyðug loyvi eru ikki tøk. Tað tykist neyðugt at lýsa hetta út í æsir enn eina ferð, tí fleiri viðmerkingar hava staðið í bløðunum, sum greitt vísa, at fólk hava misskilt støðuna.

Tað er ikki, sum Sverre Kruse skrivar í Dimmalætting 28. sept., at „so kom Náttúrufriðingarnevndin uppí og segði stopp. Hon vildi friða hetta runudíkið." Veruleikin er, at Eiðis kommuna breyt lógina, og Náttúrufriðingarnevndin hevur kravt, at lógin skal haldast. Fuglafrøðifelagið hevur tað greiðu støðu, at tann oyðing av friðaðum lendi, sum longu er farin fram – lógarbrotið – eigur at fáa fylgjur fyri tey seku.

**Nógv ólóglig bygging?**
Tíverri steðgar søgan ikki her, tí nakað rættiliga ørkymlandi er komið fram í fjølmiðlunum. Í einari samrøðu í Dimmalætting stendur at lesa 20. sept. „Tó heldur Anfinn Kruse, at tað er løgið so nógv onnur byggimál á Eiði fáa frið, sum eisini liggja innan fyri 300 metrar markið", og HKM vísir somuleiðis til, at nógv hevur verið gjørt innan fyri 300 metrar frá Vatninum – „Ein barnagarður", „Korndalsbýlið", „garasju" og „útbyggja húsini". Her rør sjálvur varaborgarstjórin upp undir, at her tróta loyvir í nógvum øðrum førum. Á Eiði er sostatt nógv ólóglig bygging farin fram í friðaðum lendi, og hetta er lendi, sum hevur stóran týdning fyri fuglalívið.

Fuglafrøðifelagið vil hervið heita á avvarðandi myndugleikar um at taka hetta, sum Anfinn Kruse og Hans Kárason Mikkelsen nevna, upp til viðgerðar.

# Hevur løgmaður lagt frá sær?

HEIDI PETERSEN



(Men gloymt at boða tinginum og Føroya fólki frá?)

Hava verið til arbeiðis í tinginum seinastu dagarnar, og sami ruðuleiki sum hevur verið í landsins leiðslu seinastu knapt fýra árini, kemur nú eisini týðuliga til sjóndar í arbeiðinum á Føroya Løgtingi.

Tilvildin er tann sum ræður, og tað gerst sjónligari og sjónligari fyri hvønn dag sum gongur, at her hvørki er ella vil vera nakar sum traðkar fram og vil taka ábyrgd og seta út í kortið hvagar leiðin hjá føroyska samfelagnum skal ganga.

Búskapurin siglir sín egna sjógv, vantandi langtíðarplanlegging á øllum økjum, alt koyrir uppá besta beskubb. Eitt nú hvørjar íløgur skulu raðfestast innan gransking, granskingarpark ella gransking? Hvørjar íløgur skulu raðfestast innan samferðslukervi, flogvøllur ella Sandoyartunnil? Hvørjar íløgur skulu raðfestast innan heilsuverki, at skráseta mistøk hjá hvørjum øðrum ella at góðskumenna sjúklingaviðgerðirnar? Hvørjar íløgur skulu raðfestast innan útbúgving, uttanatslæra ella eftirútbúgving av lærarum? Hvørjar íløgur innan mentan skulu raðfestast yvirhøvur?

Hetta er sera ringt at fáa eyga á nú fíggjarlógin er løgd fram og hvør landsstýrismaður roynir at yvirbjóða hvønn annan við einum stórfingnum projecti fyri og øðrum eftir. Flogvøllur, undirsjóvartunnil, trygdarmiðstøð, granskarapark, fyritíðarpensjónir í næsta valskeiðið, skattalættar í næsta valskeiðið, og you name it, her eru ongi mørk fyri hvussu valstríð kann rekast við almennum pengum úr landskassanum.

Og ikki nokk við tí, til viðgerðirnar av týðandi málum í tinginum, hvørki hoyrist ella sæst landsstýrið. Hava júst viðgjørt mál um at veita fyritíðarpensionistum við lægstu fyritíðarpensjón betri kor, ein roynd sum hevur verið gjørd á hvørjum árið í hesum valskeiðinum, men ongin áhugi frá samgonguni, landsstýrismaðurin hvørki hoyrdist ella sást í tinginum.

Uppskot um at gera munandi náttúrufriðingarátøk í føroysku náttúruni, at skipa tjóðarlundir í Føroyum, men ongin áhugi frá samgonguni, landsstýrismaðurin hvørki hoyrdist ella sást í tinginum.

Viðgerð av umsókn um EFTA limaskap hjá Føroyum, eitt sera týðandi mál fyri framtíðar føroysk handilsviðurskifti, men sama søga endurtók seg, Føroya løgmaður, sum varar av málinum, hvørki hoyrdist ella sást í tinginum.

Alt hetta sjálvt um tað er skylda hjá landsstýrismanninum at vera til staðar tá løgtingið hevur fund.

So, álvaratos, hevur løgmaður lagt frá sær, men gloymt at boða Tinginum og Føroya fólki frá?

# Lóggevast skal

JÓGVAN VIÐ KELDU
tingmaður
Fólkafloksins



**....men at lóggeva sær undan ábyrgd fær vanliga syrgiligar avleiðingar í seinna enda**

Seinasta fríggjadag fekk uppskotið "løgtingslóg um barnaumboðsmann" fyrstu viðgerð. Tjóðveldi átti uppskotið.

Ætlanin við uppskotinum er, at stovnsettur verður ein umboðsstovnur,"..... ið tænir børnum, bøtir um barnakor og tekur sær av teimum rættindum og tí tørvi, ið børn hava sambært hesari lóggávu,..."

Her hjá okkum við 48túsund íbúgvum, er familjan hornasteinurin undir einum mennandi samfelagi. Tann dýrgripur børnini eru, verður ongantíð ov væl farin um.

**Brúka ábyrgdir til fulnar**
Okkara børn og uppvaksandi ættarlið eiga nógvar tættir, sum hava ábyrgd, sum forða fyri, at børnini falla niður ímillum.

Fyrsti tátturin er foreldrini, sum eiga at síggja álvarsemið í at geva barninum eitt so gott lív, sum gjørligt. Við at fáa eitt barn, hava foreldrini samstundis átikið sær eina nýggja og ofta ókenda ábyrgd, sum gevur serstaka gleði, tá rætt er atborið.

Aðrir tættir eru familjan, námsfrøðingar, lærarar, læknar og aðrir stovnar.

Tá námsfrøðingar, lærarar og læknar taka eina útbúgving, átaka tey sær samstundis eina meiri ella minni uppalandi ábyrgd, ið skal takast í álvara. Umráðandi er, tá vit hava so nógvar ymiskligar tættir, at hesir verða til fulnar brúktir.

Tá so onkur kemur út í trupulleikar, tað er altíð eitt fátal, sum tó taka tíð, skulu barnaverndir og Barnaverndarstovan taka við beinanvegin, soleiðis at luturin hjá løgreglumyndugleikanum gerst so lítil sum gjørligt.

**Leist eftir egnum fortreytum**
Tað tykist sum um Tjóðveldi støðugt vil innflyta danskar og útlendskar stovnar til Føroya, og billa fólki inn, at so eru vit við í altjóðagerðini, heldur enn at hava leist eftir egnum fortreytum.

Her er høvið at mina á, at skal okkum eydnast at verða frammarlaga í altjóðagerðini, og liggja í fremstu røð í 2015, er neyðugt fyrst og fremst at hava okkara egnu bein at standa á, ikki bara politiskt sjálvræðisliga, men eitt samfelag sum er bygt upp praktiskt fólksliga, mentanarliga, vinnuliga, eftir egnum leisti.

Fólkaflokkurin hevur sum skjaldramerki, at familjan er hornasteinurin við ábyrgd, at vit ikki bara lóggeva okkum undan ábyrgd og trúgva, at so eru trupulleikanir loystir.

Okkara stovnar skulu virka til fulnar (optimalt), áðrenn lagdar verða nýggjar og óneyðugar rakstrarútreiðslur á okkara fólk, sum gera, at ábyrgdin køvist "út í sandin".

# Bíblian sum barnalestur

RICHARD DANIELSEN

Herfyri var bíblian álopin fyri tað, sum hon sigur frá um teir ræðuligu dómar, sum bíða hesi jørð. Nú eru aftur álop, hesaferð um tær sexsøgur, sum bíblian umtalar, at tær eru óhóskandi fyri børn at lesa.

Bíblian er ein sonn bók, innblást av Gudi, sostatt er hon orð Guds til okkara. Hetta ber ikki til at reingja. Tú kanst ikki taka tað góða, hugnaliga burtur úr bíbliuni og trúgva tí, meðan tú forkastar tað, sum tú ikki hevur hug at góðtaka. Antin er bíblian tað, sum hon sigur seg at vera, orð Guds til okkara, ella er hon ein stór lygn øll, sum hon er. Men Gud havi lov, hon er sonn, dikterað av honum, sum sigur: "Eg eri sannleikin".

Hetta at har standa óhugnaligar søgur, um hvussu menniskju hava tiggjað sær gjøgnum farnar tíðir, er so, tí bíblian fjalir einki, men sigur sannleikan. Fyri tað er ikki neyðugt at lesa hetta fyri smábornum, vit standa vanliga ikki fram heldur og lesa hesar søgur út í æsir í stórum mannfjøldum. Tað eru tíðir, har man skal tala, men eisini tíðir har tú skalt tiga.

Eg vaks upp í einum heimi, har bíblian var sett í hásætið. Fyri tað blivu slík skriftstøð, sum umtala sex, ikki lisin upp. Slík evni eru so intim, at tey heldur ikki vóru lisin upp á møtum vanliga.

Er tað ikki bert av illvilja móti bíbliuni, at fólk leypa á hana um slíkt? Nú í hesum tíðum har menniskja sjálvt er farið út um øll mørk við hesum intima evni, sum hoyrir hjúnalagnum til. Menniskja sjálvt er tað, sum sendir alt rátt ósømiligt út í luftina, og ógjørligt er at forða fyri at børn sita og hyggja eftir slíkum, sum skaðar tey sálarliga.

Nei bíblian harafturímóti sigur bert frá veruleikanum, at menniskja er ein fallin skapningur og verður dømt, um tað ikki vendir við.

Tá ið eg, sum barn sat í stovuni heima, saman við foreldrum og systkjum til stuttar andaktir, og vit lósu gjøgnum opinbering Jóhannesar t.d., sum er ræðuligur lesnaður um dóm, tók eg ongan skaða av tí, tí vit vórðu samstundis lærd um tann góða Gud, sum gjøgnum Kristus hevði loyst okkum frá dóminum. Hetta varð prentað inn í okkum við orðum og góðum fyridømi.

Tí eru júst tær stundirnar nakað av tí friðsamasta, eg kann minnast aftur á.